# MARIUS, ANYTIME & DEJA VU Í KAGGANUM

Fríggjakvøldið 16.06. var konsert í Kagganum. Kaggin hevur í seinastuni havt heldur øðrvísi tiltøk í kjallaranum, og tað tykist sum um hesi tiltøk eru um at fáa fastatøkur í Kagganum. Konsertin seinasta fríggjakvøld var spennandi og fjølbroytt.

## Konsert

Rókur Jákupsson Jakobsen | rokur@sosialurin.fo
Myndir: Rókur Jákuspsson Jakobsen



*Hans Marius Ziska er ein frálíkur sangari – hann hevur eitt nútímans stíl, og hann dugur væl at tolka tekstirnar.*

Tónleikurin, ið varð framførdur í Kagganum fríggjakvøldið, var sera ymiskur. 3 bólkar upptraðkaði, og hesir 3 umboða eisini hvør sína sjangri, hóast felagsnevnarin er popp/rokkur. Fyrstir á pallin var bólkurin Marius. Við sannførandi konsertum kring landi og í útlandinum í ryggsekkinum gleddi eg meg til at hoyra Marius aftur, tí at nú var nakað liðið síðan eg seinast hevði hoyrt teir.

### Marius vísti vegin

Marius framførdi løg frá komandi fløguni, sum ber heiti "The Sky is Our Home". Tónleikurin hjá Marius ber brá av nútímans rokki og poppi.

Konsertin byrjaði við eini telduforrtitaðum beat, sum líkasum legði upp til eina øðrvísi framførslu. Og tá ið allur bólkurin kom inn í lagið, gjørdist tú beinanvegin varugur við hetta er ein samanspældur bólkur. Teir spældu sera væl – smálutirnir vóru uppá pláss, og hóast ljóðmyndin ikki var so snøgg sum hon skuldi verið, so hómaði tú væl og virðiliga hugskotini hjá bólkinum. Ljóðútgerðin í Kagganum er annars av fínasta slagið. Marius hevði eisini sín fasta ljóðmann við, og hann gjørdi sítt til at ljóðið so líðandi gjørdist betri og betri.

Frontmaðurin í Marius, Hans Marius Ziska, er ein frálíkur sangari. Hann hevur eitt nútímans stíl, og hann dugur væl at tolka tekstirnar. Sostatt fært tú sum áhoyrari álit á honum. Tó haldi eg at hann hevur rættiliga torført við at koma í samband við áhoyrararnar. Hann hevur tað við at blunda meðan hann syngur (onki ilt við tí), men sum áhoyrari vilt tú ofta skilja kenslurnar, dynamikkin sum eyguni ofta fortelja meiri um enn akkordir, tekstir og pedalar gera tað. Tú vilt samskifta við oddamannin, og hetta sleppur tú ikki rættiliga, tá ið Marius framførir. Tað skal tó sigast, at Marius var fyrstur á pallin, og tað er ofta ein tung uppgáva at trína á ein "kaldan" pall.

Eg haldi at tað mesta av tónleikinum hjá Marius er á einum høgum støðið. Tó sat eg onkuntíð við eini kenslu av, at laglinjurnar (melodiirnir) kendist fremmandir í løgunum. Hetta er ofta nakað sum kemur fyri, tá ið bólkar býta tónleikin uppí tónleik og laglinju hvør sær. Bólkurin tekur sær av tónleikinum, og so verður ein laglinja lagd oman á tónleikin. Hvussu teir innanhýsis bólka tónleikin í Marius, veit eg onki um, men eg helt meg onkuntíð hóma at løgini ikki vóru so komplett, sum tey kundu verið. Tó



*Røddin hjá Brandi kann væl standa mát við aðrar góðar popprøddir her á landið so sum tann hjá Kim Hansen.*

skal sigast at í løgum sum "Your So Close..." (veit ikki hvussu tað eitur, tí at bólkurin gloymdi alt ov ofta at greiða okkum frá hvørji løg teir spældu), kanst tú merkja eitt totalt komplett lag. Ekstremt væl skrivað og heilt vist eitt 15 tær bestu hit tá ið fløgan verður útgivin.

Seinasta lagið ið bólkurin framførdi var ein frumframførsla. Haldi næstan at lagið var tað besta á kvøldinum – eitt rættiligt noise-popp lag. Har vóru stuttligir smálutur við, so sum eitt klappi stykkið. Meir av hasum.

Nú tá ið eg lesi tað sum eg júst havi skrivað um framførsluna hjá Marius, so haldi eg at hetta virkar so nokkso negativt. Orsøkin til at eg skrivi tað soleiðis er heilt einfalt tann, at eg meti Marius vera ein hin allarbesta rokkbólkin í Føroyum í dag. Manningin er sera góð og sangarin er ótrúliga dugnaligur. Bólkurin er á tremur við góðum hugskotum, so tað verður spennandi at fylgja hesum bólki framyvir.

### Rættur poppur

Tað er so gleðiligt at tað eru bólkar í Føroyum sum "tora" at spæla popptónleik. Orðið "popp" var mestsum ólógligt millum tónleikarar í 90´unum og í byrjanini av 00´unum. Men nú tykist tað sum um vend er komin í. Anytime spælir rættan popptónleik, sum vit kenna hann frá Robbie Williams & Co.

Tað hoyrdist væl á bólkinum, at hann er ikki so samanspældur enn, men onki løgi er í tí – manningin er ung, og hetta er sum áður sagt bara tann triðja framførslan hjá bólkinum. Teir skulu tó hava rós fyri løgini. Eg haldi at tað er oddafiskurin Brandur Enni, sum hevur skrivað tey flestu løgini, og hetta er hann komin væl frá. Tú hoyrir væl at lagskrivingin er á einum serliga høgum støðið, tí at øll løgini hava okkurt gott, spennandi í sær. Hetta er rættiliga sermerkt fyri ein so ungan bólk.

Eisini skal Brandur hava rós fyri sína framførslu. Tað er púra óneyðugt hjá mær at skriva at Brandur er ein gávuríkur sangari – hetta hava føroyingar vita líka síðan Brandur var ein lítil drongur. Nú syngur hann sum ein ungur maður, og hansara rødd kann væl standa mát við aðrar góðar popprøddir her á landið so sum tann hjá Kim Hansen.

Hóast samlaða framførslan hjá Anytime var merkt av, at bólkurin er ungur og ikki heilt samanspældur, so er tað avbera týdningarmikið at manningin díkir á við venjing. Anytime prógvaði, at hetta er ein bólkur við stórum potentiali, og vit skulu minnast til at teir spældu í einar 45 minuttir, og tilfarið var alt heimagjørt – tað má sigast at vera flott!!!

### Og so Deja Vu

Framførslan hjá Deja Vu var ógviliga avslappað. Eg spurdi teir frammanundan um eg kundi fáa eitt eintak av settlistanum (raðfylgjan av sangunum), men teir søgdu seg slett ikki hava avgjørt hvørji løg teir fóru at spæla. Hetta helt eg vera nokkso stuttligt, tí tá ið teir vóru á palli tóktist teir ógviliga róligir. Onki við at stressa um "hvat skulu vit nú spæla???", men meir ein laid back stílur sum hóskar seg væl til teirra heldur skeiva, rokk/popp tónleik.

Deja Vu spældi tó hart – nógv for hart. Anleggið stóð um at bresta, og somuleiðis var við mínum oyrum. Eg haldi eisini at vokalarnir hjá teimum hava ljóðað betri enn fríggjakvøldið, og eg rokni við, at hetta var tí at tónleikurin var so harður, at sangararnir ikki hoyrdi seg sjálvar nóg væl á pallinum.

Seinasta lagið hjá Deja Vu var sera, sera, sera gott. Haldi at tað eitur Wake You Up. Hetta lagið er nýtt og hevur veruliga altjóða dygdir. Tað er sera gleðiligt at hoyra Deja Vu enn kunnu taka meg og onnur á bólið, hóast at eg havi hoyrt 1000 ferðir áður. Meir av hasum, dreingir.

Konsertin fríggjakvøldið var rættiliga spennandi. Tað sum er serliga spennandi við henni er, at Kaggin hevur ein pall sum ungir føroyskir bólkar sóknast. Um hesi tiltøk halda áfram fara vit heilt vist eisini merkja tað á tí tónleiki sum verður framleiddur, tí at bólkar gera meiri tónleik um tað eru útlit fyri at framføra tónleikin onkrastaðni.